# ÚTBJÓÐINGARSKRIV

KT VERKÆTLANARLEIÐARI TIL GJALDSTOVUNA

GJALDSTOVAN

INNIHALD


| | | |
|---|---|---|
| 1. | KT verkætlanarleiðari til Gjaldstovuna | 3 |
| a. | Yvirskipað | 3 |
| b. | Uppgávan | 3 |
| c. | Væntað tímatal og arbeiðsstaður | 4 |
| d. | Krøv til verkætlanarleiðara | 4 |
| e. | Krøv til tilboð | 5 |
| f. | Sáttmálatreytir | 6 |
| 2. | Meting av tilboðum | 6 |
| g. | Mannagongd í sambandi við meting av tilboðum | 6 |
| 3. | Hentar upplýsingar | 10 |
| a. | Spurningar | 10 |
| b. | Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði | 11 |
| c. | Trú og heiður váttan | 11 |
| 4. | Tillutan av sáttmála og endi á útboði | 11 |

## KT verkætlanarleiðari til Gjaldstovuna

### a. *Yvirskipað*

Gjaldstovan, KT Landsins vil við hesari áheitan bjóða út KT verkætlanarleiðara til Gjaldstovuna.

### b. *Uppgávan*

Sáttmálin fevnir um KT verkætlanarleiðslu í víðastu merking.

Verkætlanarleiðarin fer at arbeiða tvørturum allar tænasturnar á Gjaldstovuni, og verkætlanirnar kunnu vera ymiskar í vavi. Sum dømi er talan um at fáa írestandi stovnar og undirvísingarstovnar knýttar í okkara kervi. Harumframt skulu sáttmálar við stovnar endurskoðast og standardiserast og brúkaravinsemið í Billing skipanini betrast. Á skránni er m.a.:

- Skjalhald uppstigan (miðal)
- Skjalhald avhending (stór)
- Innliming av stovnum í Landsnet (stór)
- Innliming av skúlum í Skúlanet (stór)
- Sáttmálar við stovnar (miðal til stór)
- Umbygging av Billing front end (miðal)

Uppgávan fevnir um:

- at fremja verkætlanir og tað arbeiðið, sum hesar hava við sær

- at tryggja framdrátt í mun til tíðarætlan á verkætlanunum og lata frágreiðingar til stýrisbólk
- at hava samskifti í verkætlanunum
- at tíðarætlanir og fíggjarætlanir halda
- at fáa verkætlanirnar í mál.



## *c. Væntað tímatal og arbeiðsstaður*

Gjaldstovan væntar at uppgávan er umleið 1.200 tímar í virknari arbeiðstíð um árið, hetta er ein leyslig meting. Gjaldstovan kann ikki binda seg til eitt ávíst tímatal orsakað av, at talan er um verkætlanir, vit gera saman við øðrum.

Arbeiðsstaðurin er Gjaldstovan, KT Landsins og á stovnum vit samstarva við.

## *d. Krøv til verkætlanarleiðara*

Verkætlanarleiðari skal vera ein nevndur persónur. Um talan er um fyritøku, ið velur at bjóða, so skal vera viðmerkt, hvør persónurin er, ið skal standa fyri uppgávuni.

Verkætlanarleiðarin skal byrja skjótast gjørligt.

Vit ímynda okkum, at verkætlanarleiðarin:

- hevur viðkomandi útbúgving frá hægri lærustovni

- hevur 2 ára skjalprógvaðar royndir við uppgávum í verkætlanum innan almenna fyrisiting
- hevur arbeitt við grundleggjandi leiðsluamboðum innan verkætlan, *og tað er umráðandi*
- arbeiðir skipað
- hevur góð samstarvs- og samskiftisevni
- hevur góða heildarfatan av KT
- hevur lætt við at seta seg inn í nýggjar skipanir
- skilir, skrivar og tosar føroyskt.



## *e. Krøv til tilboð*

Í tilboðnum skal vera upplýst:

- navn og CV hjá verkætlanarleiðara
- navn og skrásetingarnummar hjá fyritøku
- prísur pr. tíma uttan MVG. Gjaldstovan ynskir ikki ein veitara, sum tekur meira enn kr. 750 um tíman u/mvg fyri virkna arbeiðstíð
- hvussu krøvini til verkætlanarleiðaran, nevnd omanfyri, verða lokin
- um viðkomandi kundar, verkætlanarleiðarin hevur havt
- um viðkomandi uppgávur verkætlanarleiðarin hevur loyst.

### *f. Sáttmálatreytir*

Sáttmálin er galdandi 1 ár í senn, og kann verða longdur eitt ár í senn upp í 3 ár, um partarnir eru samdir. Sáttmálin kann uppsigast við 30 daga freist. Hetta útbjóðingarskrivið og tilboðið frá vinnandi veitara, er grundarlag fyri sáttmálanum partanna millum. 

## Meting av tilboðum

Sáttmálin verður tillutaður sambært ásettu tillutanartreyt, sum er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og førleikar. Gjaldstovan, KT Landsins brúkar fylgjandi vekting:

1. Prísur 60%
2. Førleikar 40%
    a. Viðkomandi kundar 15%
    b. Viðkomandi uppgávur 25%

### *g. Mannagongd í sambandi við meting av tilboðum*

I) Karakterstigi

Innkomin tilboð, sum lúka form- og minstukrøv, fáa stig eftir niðanfyristandandi stiga:

| Stig | Týdningur |
|---|---|
| 80 - 100 | **Avbera gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær sera stóra virðisøking / sera góður prísur. |
| 60 - 80 | **Gott**<br>Verður givið tilboðum við eginleikum ella góðsku, sum betra um loysnina, ella á annan hátt hava við sær góða virðisøking / góður prísur. |
| 40 - 60 | **Rímiligt - sum væntað**<br>Verður givið tilboðum, sum lúka tørvin ella eru við til at loysa uppgávuna / prísurin er hvørki góður ella ivingarsamur. |
| 20 - 40 | **Heldur ófullfíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava ávísar manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast við ávísum stríði / heldur ivingarsamur prísur. |
| 0 - 20 | **Ófullfíggjað**<br>Verður givið tilboðum, sum hava manglar í mun til at lúka tørvin. Uppgávan kann loysast, men til eitt støði sum akkurát kann góðtakast / ivingarsamur prísur. |

II) Prísur, hvussu verður prísur útroknaður ?

Øll tilboð, sum lúka form- og minstukrøv, fáa millum 0 - 60 stig fyri prísin.

Tilboðið við lægsta prísinum pr. tíma fær 60 stig. Restin av tilboðunum fáa stig í mun til lægsta prís pr. tíma. Um prísurin pr. tíma er lægri enn 500 kr. pr. tíma uttan MVG, verður prísurin settur til 500 kr. í samanberingini við aðrar prísir.



III) Førleikar, hvussu verða stig fyri førleikar givin ?

Førleikar eru býttir upp í tilvísingar fyri:

a. *viðkomandi kundar 15%*
b. *viðkomandi uppgávur 25%*

a. Viðkomandi kundar

Frágreiðing um viðkomandi kundar verða mettar ein og ein og fáa millum 0 - 15. 15 stig kunnu verða givin fyri tveir viðkomandi kundar, og 0 stig verða givin fyri ongar viðkomandi kundar. Tað verður mett positivt, meira viðkomandi kundarnir eru. Við viðkomandi kundar verður sipað til, í hvønn mun verkætlanarleiðarin hevur havt viðkomandi kundar, sum t.d. almennir stovnar og kommunur. **Tilboðsgevari skal ikki lata inn fleiri enn tvey dømi uppá viðkomandi kundar** og kann í mesta lagi fáa 7,5 stig pr. dømi. Stigini frá 0 - 7,5 eru grundað á eina "subjektiva” meting, t.e. meting av “hvussu viðkomandi” dømið er.

b. Viðkomandi uppgávur

Frágreiðing um viðkomandi uppgávur verða mettar ein og ein og fáa eitt samlað stigatal millum 0 - 25. 25 stig kunnu verða verða givin fyri tvær viðkomandi uppgávur, og 0 stig verður givið fyri ongar viðkomandi uppgávur. Tað verður mett positivt, meira viðkomandi uppgávurnar eru. Við viðkomandi uppgávum verður sipað til, í hvønn mun frágreiðingin

prógvar innlit í líknandi uppgávum, sum lýst í pkt. 1, og hvørjar uppgávur verkætlanarleiðarin hevur loyst. **Tilboðsgevari skal ikki lata inn fleiri enn tvey dømi uppá viðkomandi uppgávur** og kann í mesta lagi fáa 12,5 stig pr. dømi. Stigini millum 0 - 12,5 eru grundað á eina "subjektiva" meting, t.e. meting av "hvussu viðkomandi" dømið er.

IV) Samlað meting

Tá ið tilboðið er mett sambært tillutanartreytunum, verður ein samlað meting framd, sum er grundað á stigini, sum eru givin fyri tillutanartreytirnar. Dømi um samanberingar eru lýst her:

Tilboð 1: Verkætlanarleiðarin hevur havt tveir viðkomandi kundar. Hetta gevur t.d. 15 stig. Verkætlanarleiðarin hevur eisini havt eina viðkomandi uppgávu. Hetta gevur t.d. 12,5 stig. Prísurin pr. tíma er 500 kr. uttan MVG.

Tilboð 2: Verkætlanarleiðarin hevur havt tveir viðkomandi kundar. Hetta gevur t.d. 15 stig. Verkætlanarleiðarin hevur eisini havt eina viðkomandi uppgávu. Hetta gevur t.d. 12,5 stig. Prísurin pr. tíma er 600 kr. uttan MVG.

Tilboð 3: Verkætlanarleiðarin hevur havt tveir viðkomandi kundar. Hetta gevur t.d. 15 stig. Verkætlanarleiðarin hevur eisini havt tvær viðkomandi uppgávur. Hetta gevur t.d. 25 stig. Prísurin pr. tíma er 700 kr. uttan MVG.

Stigatal samanlagt = "stig fyri viðkomandi kundar" og "stig fyri viðkomandi uppgávur" + "lægsti prísur" / "tilboðsprísur" * 60

Tilboð 1: 15 + 12,5 + 500/500 x 60 = 87,50

Tilboð 2: 15 + 12,5 + 500/600 x 60 = 77,50



Tilboð 3: 15 + 25 + 500/700 x 60 = 82,85

Tilboð 1 hevur sostatt hægsta samlaða stigatalið. Sáttmálin verður tillutaður tilboðnum, ið hevur hægsta samlaða stigatalið. Innkomin tilboð, sum ikki lúka form- og minstukrøv, fáa onki stig.

## Hentar upplýsingar

### a. *Spurningar*

Tilboðsgevari hevur møguleikan at fáa fleiri upplýsingar við at seta skriftligar spurningar. Spurningar skulu sendast til Birnu Abrahamsen á:

birna@gjaldstovan.fo

Spurningar, ið eru settir fyri mikudagin 21.05.2025 kl. 16.00, verða svaraðir í seinasta lagi fríggjadagin 23.05.2025 kl. 10.00.

Spurningar verða svaraðir skrivliga og dulnevnt. Øll svar kunnu síggjast á keypsportal.fo.

### b. *Tilboðsfreist og teldupostadressa til avhendan av tilboði*

Tilboð skal latast inn við at senda teldupost til Keypsportal á:

keypsportal@gjaldstovan.fo

Tilboð kann ikki latast inn á annan hátt.

Freistin at lata inn tilboð er:

***28.05.2025 kl. 15.00***

Tilboð, ið verða latin inn aftaná hesa freist, verða ikki viðgjørd.

### c. *Trú og heiður váttan*

Tilboðsgevari skal samstundis, sum boðið verður latið inn, vátta við trú og heiður, í hvønn mun viðkomandi hevur falna almanna skuld. Tilboðsgevari skal brúka *Trú og heiður váttan* í sambandi við avhendan av tilboði.

## Tillutan av sáttmála og endi á útboði

Útbjóðari tekur avgerð um at tilluta sáttmálan, tá ið útbjóðari hevur gjørt av, hvat er fíggjarliga mest skynsama tilboðið í mun til prís og førleikar.

Útbjóðari treytar sær rættin til ikki at taka av nøkrum tilboði.

Sjálvt um sáttmálin verður tillutaður, eru tilboðsgevarar bundnir av sínum tilboði, til útbjóðari hevur undirskrivað ein sáttmála.

Útreiðslur, sum tilboðsgevarar hava í sambandi við hetta útboð, eru óviðkomandi fyri útbjóðara. Hetta er eisini galdandi, um útbjóðari tekur avgerð um, at ikki taka av nøkrum tilboði.

Gjaldstovan er fevnd av “Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina”.

| **Virksemi** | **Dagfesting, kl.** |
|---|---|
| Freist at senda inn spurningar, sbrt. pkt. 3.a. | 21.05.2025 kl. 16.00 |
| **Tilboðsfreist, sbrt. pkt. 3.b.** | 28.05.2025 kl. 15.00 |
| [illegible] | [illegible] |

Vit gleða okkum at fáa tykkara tilboð.

Vinaliga

Birna Abrahamsen

KT Landsins

Gjaldstovan